VIÐMERKINGAR

# Meira av hasum, Fogh!

**Annita á Fríðriksmørk,**
*limur í Tjóðveldisflokkinum*



Anders Fogh Rasmussen hevði eina grein í vikuskiftisbløðunum, har hann takkar og fegnast um arbeiðið, sum hann og danska stjórnin hava gjørt, og sum Løgtingssamgongan og Fólkatingið hava samtykt.

Men hesir afturvendandi setningarnir frá donskum forsætismálaráðharrum um gensidig respekt, ligeværdige parter, fælles fremtid og annað gott, sum teir óivað halda rørir hjartastreingir í Føroyum, verður eisini endurtikið upp í saman í greinini hjá Anders Fogh Rasmussen. At vit kenna endurtøkurnar aftur, kemst óivað av, at hann hevur sama Føroyapolitikk og nøkulunda somu embætismenninar, sum forsætismálaráðharrarnir undan honum.

"Hann" skrivar m.a. at *"den nye ordning.... mellem Færøernes landsstyre og den danske regering som ligeværdige parter "*. Men hyggja vit so at hesum *"nye ordning"*, so stendur har m.a., at *"Kongeriget Danmark er ét folkeretssubjekt - én stat"*. Lógin tosar als ikki um nakrar javnbjóðis partar, sum Fogh fær tað til at ljóða. Men lógin tosar um éitt fólk og éin stat.

Fogh leggur eisini dent á í greinini, at føroyingar sjálvir skulu gera av sína framtíð! Hann sigur soleiðis *" Jeg går ind for folkenes selvbestemmelsesret. Det færøske folk kan og skal selv beslutte sin fremtid."* Men hvar var hesin vilji Fogh´s, tá eitt einmælt løgting fyri tveimum árum síðani heitti á donsku stjórnina um at arbeiða fyri, at vit fingu sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum.

### Góðan karakter í atburði

Eitt er, at hann ongastaðni grundgevur fyri sínum sjónarmiðum, men tað sum verri er, er, at hann nýtir sera manipulerandi vendingar, og roynir ivaleyst soleiðis at tekkjast føroyingum. Men hann ger tíbetur so nógv av, at var eg leiðari fyri ein av sambandsflokkunum í Føroyum, so hevði eg hildið, at greinin var betur óskrivað. Men sum limur í Tjóðveldisflokkinum vil eg inniliga heita á Fogh um at koma við fleiri av hasum slagnum!

Tí júst hasin mátin at skriva uppá, er so deiliga avdúkandi. Minnir einamest um karakterirnar, sum vit fingu í barnaskúlanum: Vórðu vit fitt, skikkaðu okkum væl, sótu still og aktaðu, so fingu vit góðan karakter í atburði.

Anders Fogh gevur landsstýrinum góðan karakter í atburði. Landsstýrið hevur jú eisini verið fitt mótvegis donsku stjórnini, skikkað sær væl, sitið stilt og akta.

Men hann sigur onki um, hvat hann heldur um politiska hegni teirra og strategiska snildni.

Karakterurin í atburði hjá næmingunum segði heldur onki um, hvussu næmingurin annars kláraði seg fakliga.

### "Jeg og mine embedsmænd"

Og so skrivar Fogh, at *"Vi har sammen gennemført"*. Hann kundi fyri ein ordans skyld skriva aftanfyri orðið *"vi"*: *jeg og mine embædsmænd!* Annars kann onkur halda, at Fogh meinar við seg sjálvan og løgmann, tá ið hann tosar um *"vi"*. Men tá ið løgmaður ikki eigur ein einasta bókstav í lógartekstinum, kann orðið *"vi"* neyvan av røttum sipað til løgmann.

### Gloymið tað, sum farið er!

Fogh sigur eisini í greinini, at hann gongur inn fyri, at Føroya fólk sjálvt skal gera av sína framtíð.

Men sigur seg skilja væl, at tað kann vekja kenslur, tað sum hendi í 1946, men so biður hann okkum hyggja frameftir. Eg skilji væl, at hann royndir at fáa fokusi flutt frá fortíðini. Bað hann ikki eisini Thule búgvarnar gloyma, tá danska hervaldið tvangsflutti thulebúgvarnar, - ikki fyri 400 árum, men fyri 40 árum síðani. Hesi fólkini skulu vist eisini bara gloyma tað, sum farið er og hyggja frameftir. Ella tá ið danskir embætismenn fyri - ikki 50 men fyri 5 árum síðani fyri altjóða samfelagnum, við vilja søgdu ósannindi um føroyingar. Hetta skal sjálvandi eisini bara gloymast, og er tí ongantíð rættað! Og vit skulu í felag hyggja frameftir við gensidig respekt, í en fælles fremtid og som ligeværdige parter. Ikki so!

### Almanna og heilsuverkið verður fíggja við føroyskum skattakrónum!

Fogh skrivar eisini, at blokkstuðulin verður brúktur til almanna og heilsuverkið. Tað er heldur ikki rætt. Tað var hann inntil fyri 17 árum síðani, og var tá kallaður refusión. Nú fer blokkurin (ella endurgjaldið til føroyska samfelagið) í landskassan, og er ikki markaður til nakað sum helst.

Tað er kanska ikki av tilvild, at hann sigur, at blokkurin fer til almanna og heilsuverkið. Tað hevði jú ikki ljóða líka neyðsynjað, um hann t.d segði:

- at blokkurin, sum fer til almennan rakstrarstuðul til vinnulívið, ella
- blokkurin, sum ger tað møguligt at geva teimum hægst løntu 240 mió í skattalætta, ella
- at sagt sum var, at blokkurin er ikki annað enn eitt endurgjald fyri danskan yvirvaldsrætt í Føroyum

Tað ræður jú um at lata sum um, at blokkurin fer til almanna og heilsuverkið. Øll eru jú samd um, at almanna og heilsuverkið er tað mest grundleggjandi í samfelagið okkara.

Tí er tað genialt at siga, at blokkurin verður brúktur til almanna og heilsuverkið, ergo kunnu vit ikki verða blokkin fyri uttan. Smart!

Og so kundi eg hóskandi lagt afturat, at samstundis sum blokkurin lækkaði við einum triðingi fyri 4 árum síðani *hækkaði* játtanin til almanna og heilsuverkið.

Men til síðst vil eg takka Fogh fyri greinina og vóni at handan var bara tann fyrsta í røðini

# Viðmerking til Jan Müller

**Hjalgrim Samuelsen**



Jan Müller, blaðstjóri, fer víða um í sínum aftursvari til lesarabræv mítt um lesaratøl frá Gallup.

Alt hetta skal eg ikki gera viðmerkingar til, tí Jan helst er skeivt upplýstur av fólkum sínum í hesum málinum, og skal eg tí endurtaka, at:

- kanningin, ið greinin hjá Sosialinum byggir á, varð ikki send út fyri góðari viku síðani, sum Jan greiðir frá í síni viðmerking, men fyri meiri enn trimum vikum síðani, tann 27 mai,
- kanningin fyri mai, sum Jan heldur verða so feska, at hann einki kann kenna til hana, varð send út av Gallup 9. juni, t.v.s. 9 dagar áðrenn greinin stóð í Sosialinum.

Mótálopið hjá Jan gevur tí ikki orsøk til at taka nakað aftur, ið stóð í lesarabrævi mínum.

# Spennandi orkuprojekt

**Heri Mohr**



Við hesari yvirskrift hugleiddi Dimmalætting í oddagrein 13. juni, hvussu SEV kundi gingið á odda í alheimshøpi við einum orkuprojekti, sum kundi komið nógvum strandalondum kring knøttin til góðar; at oyggjalond kunnu fáa nakra nyttu av hesum projekti, verður tó ikki spátt um.

Oddagreinin frøist um, at mastodonturin SEV nú av álvara er farin at vísa áhuga fyri øðrum viðvarandi orkukeldum enn vatnorku. Vit fáa eisini at vita, at SEV hevur sett á stovn eitt partafelag, SeWave, saman við einum skotskum felagi við kunnleika til tøknina.

Hetta partafelagið varð stovnað í oktober 2003 við bústaði á Sandi og við Ólavi Gregersen sum stjóra. Við hálvari millión í partapeningi skal felagið arbeiða við alduorku.

Blaðið vil vera við, at hetta alduorkuprojektið kann verða so slóðbrótandi, at heimurin allur kanska fer at hyggja upp til okkum. Hóast hetta, so er tað ikki heilt av leið at spyrja, um vit ikki tosa um gamalt vín í nýggjum fløskum?

Í *Final Report SeWave* May 2005 framgongur, at síðani oktober 2003 hava *The Board of Directors*, *Steering Comittee* (allir 4 partaeigararnir í P/f SeWave), *Projekt Management Team* (Ólavur Gregersen, General Manager) og *Advisor* (Signar Heinesen) arbeitt saman við Wavegen, SEV, Landsbyggifelagnum og s/pf Data Quality v/ Signar Heinesen viðvíkjandi alduorkuprojektinum. Sambært *Final Report* (síðu 91) skuldi fyrsti partur PHASE 1 og nakað av PHASE 2 nú verið gjørt, og varð tað í 2004 mett at kosta 4,5 milliónir. Í *Final Report* sæst ongin kostnaðarmeting viðvíkjandi PHASE 2.

Og so tað gamla vínið.

Í 1979 játtaði løgtingið 10 milliónir til "SEV í grunn" og í 1980 5 milliónir, eisini til "SEV í grunn", men so broytti løgtingið navnið til "Orkugrunn".

Í árunum 1979 - 1991 (einki í 1981) játtaði løgtingið 42,05 milliónir til Orkugrunnin, og í løgmansrøðuni 1980 fingu vit at vita, at eitt orkuráð var farið til verka. Kanningar av vatnbyggingarætlanum vóru í gongd og aðrir alternativir orkumøguleikar skuldu kannast.

Sum frá leið arbeiddi Orkuráðið við fleiri projektum: Vindorku, vatnmegi, streymorku, árinskanning o.fl.ø. Harumframt veitti Orkugrunnurin í 1989 20 milliónir í láni til Fjarhitafelagið, sum skuldi brúka avlopshita frá SEV.

Orkuráðið arbeiddi við nógvum projektum (10), men í 1992 varð Orkugrunnurin likvideraður, og í 1995 varð 20-millióna lánið avskrivað sum tap og fór í sama stóra køst, har 100-tals milliónir av skattaborgaranna peningi endaðu, við katastrofalum avleiðingum fyri hvørt hús og heim í Føroyum.

Hann, køsturin, varð ongantíð skumpaður og flórurin ikki sópaður. Nú er so fráligið, og - *the rest is silence.*

Men hvussu við Orkuráðnum, er tað tikið av - og nær?

Og hvussu við øllum projektunum hjá Orkuráðnum, tey kostaðu hóast alt um 12 milliónir pluss umsiting? Varð 10 ára arbeiði fyri skattaborgaranna pening gjørt til fánýtis?

Oddagreinin er av teirri eitt sindur puerilu áskoðan, at alduorkuprojektið kann bøta um okkara so trevsuta umdømi.

Er tað nakað, vit treingja til, so er tað *tað*; men etikkur og moralur kann ikki importerast í projekti við ella uttan spekulatión.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.